# Hampiliga væl nøgdur við boðini

**Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, heldur at tilboðini upp á Farmaleiðir hjá Strandferðsluni vóru á góðari leið**

FARMALEIÐIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tilboðini upp á Farmaleiðir hjá Strandferðsluni vóru á góðari leið.

Tað heldur Jacob Vestergaard.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum er sostatt nøgdur við tey tilboð, sum komu inn upp á at keypa Farmeleiðir hjá Strandferðsluni.

Tá ið avgerð varð tikin um at einskilja Farmaleiðir hjá Strandferðsluni, vóru tær bodnar út í almennari sølu.

Freistin at lata inn tilboð, var úti í gjár og tá vórðu eisini tilboðini latin upp.

Tilsamans komu trý tilboð inn. Tað vísti seg, at Heri Thomsen í Gøtu hevði hægsta boð, sum var upp á fýra milliónir.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað var nakað niður til mittasta boðið og at tað lægsta boðið var rættiliga nógv lægri.

– Hetta var at kalla sum vit høvdu væntað. Vit høvdu ikki væntað, at tað fór at vera gravgangur eftir at keypa Farmaleiðir og vit høvdu heldur ikki væntað okkum, at tilboðini fóru at vera stórt hægri enn tey eru. So samanumtikið eri eg nøgdur, sigur Jacob Vestergaard.

Hann sigur, at metingin var kanska eina millión hægri enn tað besta tilboðið, sum kom inn.

Upprunaliga hevði landsstýrið mett seg at fáa 15 milliónir fyri Farmaleiðir.

Men tað var fyri at einskilja allar ognirnar í sambandi við Farmaleiðir.

– Tað, sum er einskilt nú, er bara ein partur av Farmaleiðum og sostatt høvdu vit als ikki roknað við eini inntøku upp á 15 milliónir fyri hendan partin av Farmaleiðum. Summi av amboðunum, sum eru seld, eru eisini nakað gomul, so virðið er avmarkað.

– Eitt stórt virðið, sum liggur eftir hjá Strandferðsluni, er eitt grundstykki í Hjalla omanfyri Havnina, sum Tórshavnar Kommuna hevur forkeyps til. Strandferðslan hevur eisini eitt pakkhús í Vági eftir, men tað er ætlanin at selja fyri seg. Harumframt eru nakrar frystilastir, nakrir bilar og onnur útgerð eftir í sambandi við pakkhúsið í Suðuroy og í sambandi við koyring í Sandoy og ymiskt annað.

Jacob Vestergaard sigur, at nú verða tey ymsu tilboðini samanborin og so verður endaliga støða tikin um søluna. Hann sigur, at ætlanin er at avgreiða søluna skjótt og at tað helst verður longu í nøstu viku, at avgerðin verður tikin.






*– Prísurin var kanska ikki tann stóri, men hetta var áleið tað, sum vit høvdu væntað at fingið fyri tann partin av Farmaleiðum, sum nú eru seld, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður*




Leiðari til sølu- og marknaðardeildina

**...at ganga nýggjar leiðir**

Dámar tær at ganga nýggjar leiðir? Setir tú smidligheit, hugflog og menning í hásæti? Og vilt tú vera við til at mynda nýggja postverkið úteftir?

Eitt spennandi og avbjóðandi starv sum leiðari fyri nýggju sølu- og marknaðardeildina hjá P/f Postverki Føroya er leyst at søkja.

Í 2005 varð Postverk Føroya broytt frá at vera ein almennur stovnur til at vera eitt alment partafelag. Við umleggingini er lagt eitt grundarlag fyri framtíðarmenningini av virkseminum hjá P/f Postverki Føroya.

Tað hevur við sær, at nýggja postverkið hevur nógv fríari ræsur at marknaðarføra seg, nútímansgera tænasturnar og kappast um kundarnar. Hetta er stór avbjóðing hjá leiðslu og starvsfólki.

**Starv og ábyrgd**
Sølu- og marknaðarleiðarin fær høvuðsábyrgdina av nýggju marknaðardeildini, ið skal menna, lýsa og marknaðarføra tænasturnar, sum postverkið fer at veita.

Umframt hetta skal marknaðarleiðarin skipa fyri arbeiðnum at broyta andlit postverksins, soleiðis at P/f Postverk Føroya gerst ímyndin av eini nútímans tænastufyritøku.

Avgreiðslurnar kring landið fara at verða nýttar til sølustøð, sýnisgluggar og kunningardeplar, og marknaðarleiðarin fær ábyrgdina av at marknaðarføra og selja hesar tænastur.

Marknaðarleiðarin vísir beinleiðis til stjóran og er partur av einum leiðslutoymi. Løn og setanarviðurskifti verða í samsvari við útbúgving, førleika og arbeiðsroyndir.

**Eginleikar og krøv**
Vit leggja dent á, at umsøkjarar eru fullir í orku og brenna fyri at gera mun. Brotið verður upp úr nýggjum, og tí eru góð greiningarevni, framskygni og stórt hugflog umráðandi eginleikar.

Tú fært tað besta fram í fólki. Tú dugir at geva íblástur og mótspæl á ein hampiligan og mennandi hátt, so at starvsfólkini trívast í sínum dagliga strevi fyri tí felags málinum at brynja postverkið til nýggjar tíðir.

Vit vænta, at tú hevur eina hægri útbúgving, sært virðið í nútímans heildarleiðslu og arbeiði við verkætlanum. Kanst tú vísa á leiðsluroyndir og góð úrslit, hevur tú fyrimun.

**Umsókn og freist**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at spyrja teg fyri hjá Bergi í Garði, stjóra, telefon 34 60 20.

Send eina umsókn við prógvum og viðkomandi ummælum innan 20. mars. Umsóknin skal sendast til:

POSTVERK FØROYA P/f
Bergur í Garði
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

Postverk Føroya P/f, Óðinshædd 2, Tel 34 60 00, Fax 34 60 03, www.postur.fo

Postverk Føroya

www.sansir.fo